# Ein bylgja av føroyskum fjølbroytni




*Suffía við Stein, grafikari hevur gjørt plakatina til fagnaðargonguna fyri føroyskum fjølbroytni*

**Ikki færri enn 2000 vitjanir hava verið á heimasíðuni www. eitt-fo.net, sum er kunningarsíða um fagnaðargonguna fyri føroyskum fjølbroytni, sum verður leygardagin. Hetta taka stigtakararnir sum greiða ábending um, at skarin verður stórur**

FAGNAÐARGONGA

Eina bylgju at kærleika hevur onkur kallað fagnaðargonguna, sum fer úr Sjónleikarhúsinum í Havn leygardagin klokkan 14 oman á Vaglið. Og tað er fitt sagt, so fyrireikararnir eru sjálvandi samdir, siga teir. Nú beint upp undir tiltakið halda tey seg hartil síggja greiðar ábendingar um, at skarin í gøtunum í Havn leygardagin verður stórur. Í dag høvdu einar 2.000 vitjanir verið á heimasíðuni, eitt-fo.net, sum er kunningarpallurin hjá fagnaðargonguni. Nøkur eintøk av plakatini, sum Suffía við Stein á Reproz hevur gjørt, eru hongd upp í høvuðsstaðnum, men øll kunnu taka hesa sera sigandi og snøggu plakat niður av somu heimasíðu og prenta hana út.

### Tónleikur fyri øll

Fyrireikararnir frætta annars, at fólk úr alskyns umhvørvum ætla sær við til fagnaðin. Sum tað ljóðar, verður Miðbýurin í Havn ein vælsignaður vavgreytur av dialektum, lívsáskoðanum, aldursbólkum og fríbrigdum annars. Umframt nógv spæl, sang, gykl og góð orð, fer ein sonn tónleikalig spreinging at gella heilt úr Tórsgøtu niðan í Norðurlandahúsið. Vit fara millum annað at hoyra: Dejavu, Havnarkórið, Kára Sverrisson, Lama Sea, Marius, Nikos Kapnas, Seks Stórar Veðrar við hornum, Spælimenn og 200. Nevnast kann, at Seks Stórir Veðrar er messingsekstett við navnframa trombonleikaranum, Dávi Juul Magnussen, og at 40 ára gamla føðingardagsbarnið, Havnarkórið, við Ólavi Hátún á odda, fer at hava stórfingna konsert í Norðurlandahúsinum aftan á fagnaðargonguna.

### Karin og kakao

Klóka konan Karin Kjølbro kemur eisini við. Hon fer at siga nøkur ógloymandi góð orð um tað einfalda at vísa hvør øðrum virðing og geva hvørjum einstøkum borgara pláss og møguleika at liva lukkuliga her í landinum, sum vit øll elska.

Og børnini? Nei, tey verða ikki slept upp á fjall men oman í Tórsgøtu. Tí við sunnara enda á Margarinfabrikkini er nevnliga okkurt deiliga ósunt á skránni. Har fæst GARASJUKAKA Í KAKAGARASJU. Tey børn, ið klára at siga hetta uttan himpr, fáa ókeypis kakao, bollar og góðgæti. Og hini, sum tíverri ikki klára tað, fáa sjálvandi eisini kakao, bollar og góðgæti fyri einki, siga fyrireikarnir, sum enda sína fagnaðar fráboðan um føroyskt fjølbroytni við orðunum hjá Paul Eluard:

Okkum er til eydnu lagað
at gera vatn til ljós,
fáa dreymar í verk,
gera óvin til vin.

**ave**

## Skrá

**Fagnaðargonga. Leygardagin 4. februar kl. 14**

- Vit savnast við Sjónleikarhúsið klokkan 14.
- Gongan fer oman eftir Niels Finsens gøtu við tónleikarum, bannarum og gyklarum á odda.
- Við Steinatún verður steðgað. Við slagorðunum »Píka! Tit eru ikki øll líka« fer maður, sum hevur skil fyri menniskjaligum frábrigdum, at skilja gánandi gonguna sundur.
- Gongan heldur lýðin leiðina fram oman á Vaglið, har hildið verður fram við hesi dagsskrá:
- Háfloygdur einglaleikur.
- Salsastúvningur í rútmugrýtu (fólk verða stúvað saman og hitað upp við roðandi karibiskum rútmum).
- Klók kona sigur nøkur kærleiksfull orð.
- Talukór.
- Felags sangur.
  Aftaná tiltakið á Vaglinum fáast bollar og kaka í KAKAGARASJUNI í Tórsgøtu, - gakk eftir luktinum!

  Síðani fara øll tuskandi yvir í Tórsgøtu, ið er umbroytt til Tónleikagøtu:
- Á Margarinfabrikkini eru sangir og søgur til børn.
- Á Meiarínum ræður rokkurin.
- Í Miðlahúsinum eru trubadurar og fólkatónleikur. Umframt tónleikin í Tórsgøtu er konsert í Norðurlandahúsinum
- Í Norðurlandahúsinum Kórsangur við Havnarkórinum

**Skrá fyri tónleikin: Í Miðlahúsinum:**
Spælimenn (Jákup Lutzen, Sharon Weiss, Hilmar Joensen, Ívar Bærentsen, Kristian Blak, o.fl.)
Kári Sverrisson
Nikos Kapnas (violin/bratsch)
Búi Dam Trio (Búi Dam, Mikael Blak, Rógvi á Rógvu)
Knút H. Eysturstein (og Heðin Ziska Davidsen)
Seks Stórir Veðrar (messing sekstett: Tróndur Olsen, Ken Jones, Niklas Mouritsen, Pauli Petersen, Dávur Juul Magnussen, Glenn Samuelsen)

**Á Meiarínum:**
Marius, 200, Lama Sea, Dejavu

**Á Margarinfabrikkini:**
Søgur, spøl og sangir fyri børnum við Hjørdis Johansen og fleiri frá Dramaverkstaðnum

**Í Norðurlandahúsinum:**
Havnarkórið við Ólavi Hátún á odda, Kórið hevur 40 ára jubileumskonsert leygardagin kl 16:00 í Norðurlandahúsinum.

# Bóka-útsølan nærkast

**29. mars – 6. mai 2006 verður aftur skipað fyri stórari várútsølu av føroyskum bókum**

BÓKAÚTSØLA

Í 1988 varð fyrstu ferð skipað fyri útsølu av føroyskum bókum. Bókhandlarafelagið og Bókadeild Føroya Lærarafelags skipaðu fyri, og var hetta stórhending tá. Nú vóru so nógvar føroyskar bøkur, at til bar at skipa fyri rimmar útsølu við fleiri hundrað bókum.

Kortini er tað greitt, at føroyski bókamarknaðurin er so mikið avmarkaður, at tað ber ikki til at halda útsølu hvørt ár. Tí er føroysk bókaútsøla bara 3. hvørt ár – og bøkurnar, ið verða seldar á útsølu, skulu í minsta lagi vera 3 ára gamlar. Tá ið tær hava verið á tveimum útsølum, sleppa tær ikki við aftur.

Nú er so aftur bókaútsøla á skránni í døgunum 29. mars til 6. mai. Bókadeild Føroya Lærarafelags sendir í hesum døgum bræv til øll forløg, har boðað verður frá hesum og greitt verður frá treytunum at sleppa upp í part. Lýsing verður eisini sett í bløðini, so fólk, ið kanska eiga bøkur, sum stigtakararnir ikki vita um, kunnu gera vart við seg.

Stór útsøluavís verður prentað og send í øll hús í landinum nakrar dagar, áðrenn útsølan byrjar. So kunnu fólk í frið og náðum kunna seg við útsølubøkurnar.

Um fólk hava spurningar ella hug at práta við onkran um útsøluna, eru tey vælkomin at tosa við Kára Árting í Bókasøluni í SMS (319575) ella við Niels Jákup Thomsen á Bókadeildini (317644).



# Ole Wich í Leikalund

**Í dag letur nógv umrøddi listamaðurin Ole Wich upp framsýning í Leikalund í Klaksvík, har millum annað verk, sum ímynda Klaksvík nú og í framtíðini eru at síggja**

LISTAFRAMSÝNING
*anna@sosialurin.fo*

Listin hjá Ole Wich er altíð skipað kring eitt konsept, sum síðani ger av, hvørjum miðli verkið verður gjørt í. Hann hevur arbeitt við akvarell og máling, skulpturi og kollagum, teksti og ljóðkollagum, tónleiki og dansi, installatión og list í miðlum og á alnetinum.

### Náttúra og politisk list

À framsýningini í Leikalund eru millum annað grafikkprent úr røðini "Starablindi" um føroyska staran at síggja. Myndirnar vísa staran, Sturnus vulgaris faroensis, sum ongin hevur sæð hann fyrr. Eisini verða tríggjar málningakollagur at síggja, sum ímynda Klaksvík nú og í framtíðini.

Seinastu tvey árini hevur Ole Wich havt installatiónir við á G!-festivalinum – í 2004 saman við Tummas Jákup Thomsen, har hann sýndi fram verkið "Køsturin", har tankin var bert at brúka skrambul og annað tilfar, sum longu var at finna í bygninginum, har verkið varð sett upp. Listamaðurin Goodipal hevði tá tvær konsertir í bygninginum. Til G!-festivalin í fjør gjørdi Ole Wich verkið "Torturur á G!" Installatiónin varð gjørd eftir áheitan frá Amnesty International, Føroya Deild, sum skeyt upp, at Ole Wich varpaði ljós á tortur við at gera eitt torturkamar á festivalinum, so fólk kundu fáa eina kenslu av slíkum brotsverkum, sum verða framd hvønn dag kring í heiminum.

Seinasta verkætlanin hjá Ole Wich var nógv umrødda HomoFObia verkið, sum varpar ljós á støðuna hjá teimum samkyndu í Føroyum. Við myndum á alnetinum festi verkið skjótt í eitt kjak um trongskygni og talufrælsi í Føroyum.

### Endurskoðað fatan av gomlum ímyndum

Í næstum fer Ole Wich at arbeiða við fotoverkinum "Landnem", sum snýr seg um at skapa eina aðra fatan av kroppi og føroyska landslagnum. Ì løtuni arbeiðir hann við verkinum "Den blinde plet", sum snýr seg um føroyska nationalismu og eina endurskoðaða fatan av ímyndini Nólsoyar Páll. Eisini arbeiðir hann við verkinum, "vitaminnord.info", sum snýr seg um at skipa ein dátugrunn á alnetinum yvir útlendingar, sum hava latið týðandi íkast til føroyska mentan.

Á heimasíðuni www.olewich.com ber til at síggga eitt yvirlit yvir verkini hjá listamanninum.

Framsýningini hjá Ole Wich í Leikalund letur upp í dag kl 16.00 og verður at síggja allan februar mánað.